DAGSINS MEINING

Rentustuðulin

Landsstýrið ætlar at avtaka rentustuðulin til sethúsbygging og farið er longu við komandi fíggjarlóg undir at minka stuðulin úr 40% av rentútreiðslunum niður í 37%. Rentustuðulin er avgerandi fyri, at ungfók skulu kunna seta búgv, so heldur enn at lækka stuðulin, átti landsstýrið at hækkað stuðulin. Undir kreppuni var stuðulin 48%, og er hetta ein orsøkin til, at fleiri, sum nýliga høvdu bygt, ikki mistu húsini.

Tað verður sagt, at búskaparligar orsøkir eru til inntrivið við at lækka rentustuðulin. Eisini vil Fíggjarmálaráðið verða við, at húsaprísirnir fara at lækka, um rentustuðulin verður tikin burtur. Hesum trýr eingin, tí vit sóu einki til, at húsaprísirnir lækkaðu, so hvørt sum stuðulin er lækkaður úr 48% niður í 40%. Tann veruliga orsøkin til lækkingina er, at landsstýrið nú má spara, tí tað av álvara er farið at sansa at fíggjarliga. Heldur enn at skera í rentustuðulin átti landsstýrið at komið við eini politiskari ætlan til tess at tryggja øllum borgarum tak yvir høvdið.

Tann veruliga orsøkin er altso ein sparing uppá umleið 15 milliónir, ella við øðrum orðum er talan um eina av mongum sparingum næsta ár. Tað er ov vánaligt av landsstýrinum at kamuflera lækkingina við búskaparligum grundgevingum, heldur enn siga sum er: vit eru noyddir at skera so og so nógv av fíggjarlógini 2004, og lækkingin er ein liður í hesi tilgongd. Tá politikkarar ikki siga sannleikan, gerast fólk ótrygg og tað fer at tróta við álitinum á landsins stýri.

Tað er ein onnur síða av hesi søk nevniliga hetta, at sparingarnar, og tær eru nógvar, tykjast einvíst at fara at raka tey veikastu í samfelagnum. Hetta hendir, hóast landsstýrið hevur lovað, at tey veikastu skuldu verða hildin uttan fyri sparingarnar. Við lækkingini av rentustuðlinum verða tey ungu, sum skulu seta búgv, meint rakt. Vit kundu nevnt onnur dømi: stuðulin til feløgini hjá teimum brekaðu, viðgerðir uttanlanda, barnaforsorgarøkið, kaos á barnsburðarøkinum og kaos á pensiónsøkinum, ja milt sagt kaos á so nógvum økjum, og at so er, er veljarakanningin hjá SvF og Dimmu ein greið ábending um.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ein oyggj 6000 fólk

Nita Næs
í Nesi í Hvalba

Tað er altíð áhugavert og læruríkt at lesa, hvat skilamenn skriva. Lesarabrævið hjá Ólavi Rasmussen í Sosialinum nú ein dagin um kommunuviðurskifti í Suðuroy, fekk meg at hugsa.

Í 1985/86 búði eg í Bonn í Týsklandi. Ein HF flokkur úr Suðuroy fór tá til Berlin á námsferð. Eg fleyg úr Bonn og var saman við teimum har eina viku. Vit gistu sjálvsagt í Vestur Berlin, tí tá var einans loyvt at gera dagsferðir til Eystur Berlin.

Hetta var ein sera spennandi og hendingarrík vika. Vit vóru tvær dagsferðir í Eystur Berlin. Í báðum pørtunum av Berlin vitjaðu vit skúlar.

Vit vóru við í vanligu undirvísingini og komu í prát við vanliga týska ungdómin.

Tað var ein løgin kendsla at vitja ein bý, ið onkursvegna hevði tvey andlit.

Sjálvsagt var Vesturtýskland tá, eins og í dag, ríkari tókniliga og búskaparliga. Alt var nýmótans og býarlívið hevði eina lívsjáttandi rytmu. Býarreklamurnar bleiktraðu og hugdu lokkandi at okkum føroysku bygdabørnum úr Suðuroy.

Vit tosaðu nógv um munin í millum Eystur- Vestur Berlin. Og sóu nógv gott úr báðum pørtunum í býnum. Ungdómurin í Eystur Berlin líktist á ein ella annan hátt meira okkum føroyingum, enn tey ungu úr Vestur Berlin. Hetta hildu vit vera løgið, tí vit vóru jú ein partur av fría og nútíðar vesturheiminum. Vit komu lættari í samband við tey, enn við tey ungu úr Vestur Berlin. Nú skal sjálvsagt, havast í huga, at vit einans vóru har í eina viku.

Tað sum eg vil siga við hesum er, at tað eru ikki altíð menniskjagjørdar pappírs-skipanir, ið liggja til grund fyri, hvussu vit menniskju hava tað, um vit liva lukkulig og eru nøgd. Sjálvsagt gera politiskar skilagóðar loysnir okkum lívið lættari, og vónandi mentanarliga ríkari.

Alt hetta, eg her havi sagt, hevur einki við fundin í Øravík, tann 5.november um kommunuviðurskiftini í Suðuroynni, at gera. Um tað hevði, so høvdu ord míni veri tómur RETO-RIKKUR. Tí eg haldi ikki, at Berlinmúrurin kann brúkast sum myndatala um oyggj okkara.

Í føroyskum politikki er alt ov nógvur tómur retorikkur. Hetta kann vera ein lættur háttur at siga nakað stórt, uttan at siga nakað kortini. Hetta duga serliga royndu politikarar væl. Vanliga sleppa teir við slíkari talu.

Um vit hugsa um framtíðar Suðuroynna, so dugi eg ikki at siga, og havi onga lidna hugsan um, hvussu oyggin skal formast. Um vit skulu vera ein kommuna, tvær kommunur, sjey kommunur, ella alt landið ein kommuna.

Men tað, sum eg fleiri ferðir havi víst á, er,at vit menniskju, fólkavald ella ikki, mugu hugsa fram um okkara egna valdømi, fram um okkara egna garð, hús, flokk, og serliga fram um okkara egnu tíð.

Nakað sum vit føroyingar kanska skuldu gjørt framyvir, er, at hugsa stórt, men í smáum. Um vit taka eina luftmynd av landi okkara, hvussu nógvar hevnir, hava vit so? Hvørjar eru alneyðugar? Hvussu nógv mentanarhús fara vit at fáa í framtíðini? Mangan er einans eitt fjall ella bara tvey fjøll millum tvær kommunir, og kortini eru fólk ikki nøgd, fyrr enn tey hava fingið eitt mentanarhús, ein biograf, ein svimjuhyl í sínari egnu kommunu.

Ì einum landi við 48000 menniskjum, er hetta ørskapur og hongur búskaparliga og menniskjaliga ikki saman. Hví vilja vit hava alt so nær okkum sjálvum? Øll hava vit finar, nýggjar bilar, og í flestu førum almennir góðir vegir, ið binda landið saman.

Hugsa vit aftur um Suðuroy, so er tað ait meira samband millum bygdirnar í oynni. Fólk kunnu arbeiða í Sandvík og syngja í Vági. Arbeiða í Vági og venja á Tvøroyri. Búgva í Famjin og arbeiða í Hvalba o.s.fv.

Nei, ongin Berlinmúrur er í Suðuroy. Hvørki í okkara hjørtum ella á Hovsegg, og sum Ólavur Rasmussen sigur, honum hava vit heldur ikki brúk fyri.

Men, hvat er tað so, sum Ólavur nertur við og rakar. Kanska er tað okkara nútíðar persónsmensku. Hetta, at vit vilja eiga alt og øll. Vit vilja hava persónliga ræðið á økinum, á tíðini, á projektinum o.s.fr.

Flestu kommunuvaldir politikarar, seta eina møguliga kommunu- samanlegging í samband við hesa samgonguna. Tað, at samgongan leggur ymisk málsøki út til kommunirnar at umsita. Tosað hevur verið nógv um, at so má peningur fylgja við, og ein góð lóg, sum tryggjar at hvør einstøk kommuna umsitur málið forsvarliga.

At leggja ymisk landsmál út á kommunurnar, kenna vit frá grannalondum okkara. Her hava aftur okkara landspolitikarar, ikki dugað ella torað at hugsa øðrvísini enn landspolitikarin í eitt nú Danmark.

Her átti teir at havt torað at hugsa nýtt, og latið landið umsitið hesu øki. Vit eru so fá í Føroyum, so tað átti at verið ein løtt og spennandi uppgáva hjá landsins mynduleika at umsita búskaparliga.

Søguliga hava almennu Føroyar, ikki umsitið hesi øki, ið nú skulu leggjast út á kommunirnar, meiri enn nøkur fá ár. Framfýsnir polikikarar hava einferð arbeitt fyri, at umsitingin varð latin okkum føroyingum. So, hví ljósritað gerðir og hugsjónir frá øðrum londum. Hví leggja sera tung og kostnaðarmikil øki út á kommunirnar ?

Hví gera tað?

Vit borgarar sakna eina upplýsandi og sigandi grundgeving fyri, hví ávís tung, búarskaparlig øki skulu leggjast út á kommunurnar.

Kritiskir spurningar, sakna vit eisini, spurningar, so sum: Verða økini, um tey vera løgd út á kommunurnar, eins umsitin, og eins fyri allastaðni í landinum??? Hetta eru spurningar, sum eru álvarsamir og sum alt ov lítið kjak hevur verið um.

Borgarin kemur nærri tænastuni, siga politikarir, tá øki verða løgd út, men um ein er bangin fyri, at borgarin er ov langt burtur frá tænastuni, so skuldi landið havt ráðleggingarskrivstovur nær borgaranum, har borgarin kundi fingið alla ta hjálp honum nýttist. Slíkar skrivstovur hava vit longu fleiri av og tær rigga væl.

Nei, ein møgulig samanlegging í Suðuroy, skal ikki vera tengd at, at Tinganes hóttir kommunurnar við pengapunginum. Ein møgulig samanlegging skal koma úr hugaheimi og vilja suðuroyinga.

Vit suðuroyingar skulu standa saman, sama um kommunurnar leggja saman ella ei. Samanhald kemur ikki av sær sjálvum. Ein kommunusamanlegging kemur ikki av sær sjálvari. Hetta kann bert henda við fólksins vilja.

Livst, so spyrst.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Meiri vitan til søguhungrandi Skaale

Virgar T. Dalsgaard

Longu langt áðrenn kríggið og, ið hvussu so er, líka síðani 1943, tá ið Petur Mohr Dam saman við øðrum javnaðarmonnum skrivaði *Vina- og frælsisbrævið,* sum gjørdist fundamentið undir javnaðarfloksins ríkispolitisku støðu, hevur fáur veljari í sjálvstýris-, javnaðar- ella sambandsflokkinum verið í iva um, at Danmark *ikki* var og heldur aldri hevur verið nakað imperialistiskt kúgingarveldi, tvørturímóti – Danmark er eitt av teimum fáu londum, sum kann vera errið av sínum skilagóða og hóvliga politikki, bæði yvirfyri føroyingum og øðrum.

Tá ið Petur Mohr Dam, kom við *vina- og frælsisbrævinum,* sum var fyrsta útkasti til seinnu heimastýrislógina, háðaði Jóanes Patursson hann við orðunum um, at uppskotið var rein *utopi,* tí hvørki Danmark ella nakað annað land í verðini, vildi á nøkrum sinni geva einum øðrum fólki *so* skilagóða og *so* ideella skipan! Hetta er vitnisfast og keldugreitt, harra Skaale!

MEN, bara fimm ár seinni í 1948 varð heimastýrislógin veruleiki, og heimastýrislógin var í hugburði næstan orðarætt *avskrift* av uppskoti javnaðarmanna, men fyrst og fremst av *vina- og frælsisbrævi* Petur Mohr Dams!!! Nú var tað *utopiska* hent, minni enn tvey ár eftir, at Jóannes kongsbóndi var farin undir grønu torvu.

Vit síggja kring okkum, hvussu t.d. Hetland, Orknoyggjar og onnur lond eru mentanarliga týnd, hóast tey høvdu nógv meira at standa ímóti við, enn vit høvdu. Ynsktu danir í síni tíð at gera tað, kundu teir lættliga, so fámentir vit føroyingar vóru, útrudda okk-ara mál og mentan, eins og gjørt var av onglendingum í Hetlandi og Orknoyggjum, *men danir gjørdu tað ikki*! Her er fundamentali munurin á donskum og imperialístiskum hugburði!

Um somu tíð sum skotski aðalsmaðurin, *Robert Stuart* og seinni blóðtysti sonur hansara, jallurin, *sir Patrick,* (t.d. síðst í 16. og fyrst aí 17. øld) trælkaði og píndi hetlendska fólkið við kyniskum morðum, tortur og miskunnarleysari forfylging, bæði mentanarligari og fíggjarligari, sótu rættiliga skikkiligir danskir embætismenn og royndu *eftir førimuni* at hjálpa og dugna føroyingum við alskyns praktiskum málum, um enn hesir danir ikki altíð vóru tey allarbestu høvdini frá Keypmannahavnar Universiteti – (harra Klæmint á Sandoynni er eitt ótespuligt undantak – og tó var hann munandi frægari enn teir fúlu *riðifútar*, sum plágaðu danskar bøndur ta somu tíðina).

Í Hetlandi varð bølmennið, sir Patrick til endans handtikin og hálshøgdur í Edinburg (1615), men tá høvdu hetlendingar klagað og gramt seg til fánýtis í áravís, uttan at fáa *nakað* rættvísi frá Onglandi. Og sjálvt um órættvísið linkaði nakað, helt tað ikki uppat við handtøkuni av sir Patrick, nei, onglendingar hildu fram við yvirganginum og førdu næstan alla tíðina ein miðvísan og beinharðan málkúgingarpolitikk, so teir at enda heilt fingu beint fyri tí norrønu tungu, sum hetlendingar høvdu eins væl og vit. Her var munur á mjúkari danskari pragmatismu og eirindaleysum eingilskum jarnhæli. Hvussu nógvir føroyskir skúlanæmingar fáa við *tvørsøguligari* samanbering at vita, hvussu astronomiskur munurin var ímillum, hvussu hetlendingar og orknoyingar høvdu tað frá trúbótini og fram til 19. øld, og so hvussu viðurskiftini vóru í Føroyum um somu tíð. Teir fyrru fingu mál og mentan fullkomuliga týnda, meðan vit føroyingar við m.a. danskari embætismanna- og seinni universitetshjálp fingu stuðla føroyskum mentanararbeiði. Hevði tað ikki klætt imperialistiska enska harðveldinum at havt stuðlað eynum hentlendskum pendant til okkara Svabo í staðin fyri at beina fyri hetlendskum máli og mentan? Her er astronomiskur munur á danskari- og enskari fólkamuru!

Symbiosa er lívsfrælsi

Alt hetta vit søgukøn fólk, men bara ikki fólkaupplýsan okkara, harra Sjúrður Skaale – hóast hann væl hevur havt høvi til at sett seg inn í hesi viðurskifti – hann kundi havt lisið sær eitt sindur uppá – hann kundi t.d. eisini havt lisið greinir P. M. Dams um *lívsfrælsi*. Fyri P. M. Dam var tað, sum umráddi, at *í Føroyum skuldu føroyingar líva,* og hann andøvdi harðliga móti *tóma* rakstrarrópinum hjá tjóðveldisflokkinum um, at í Føroyum skuldu føroyingar ráða. – Hvat skuldu føroyingar ráða yvir og *hvør* skuldi ráða? Er nakað vunnið við at ráða í eini socialari oyðimørk? Ja, harra S. Skaale kundi eisini havt sett seg inn í tankarnar um symbiosu millum tvær tjóðir, har *báðir partar fáa meira* burtur úr, enn við at vera hvør sær. Harra SS kundi havt lurtað eftir ella lisið tað, sum bæði Anton Degn, Louis Zachariassen, Edvard Mitens, John Davidsen, Georg Lindenskov Samuelsen, Atli Dam, Jóannes Eidesgaard og nógv, nógv onnur hava fført fram ótaldar ferðir.

MEN hann lurtaði ikki, hann tímdi ikki, nei, hann helt primitivt fram við at júka og trútta um danska kúging, yvirgang og annað ósøguligt møsn í mánaðavís…INNTIL, ja, haldið nú fast, hann hevur verið á mafiuoynni Siciliu á minnilutafundi og yviri í ST á eini dansktfíggjaðari útferð saman við einum donskum professara og einum íslendskum ditto. Og so er knappliga vent í holuni – okkara víðaferðandi fólkatingsdiplomatur, harra S. Skaale hevur á síni ST-ferð fingið tey dølsku tjóðveldiseyguni upp og skrivar nú hámur og skammarplágaður í blaðnum Fregnir (orðið merkir *slatur og sleyg*), at hann hevur funnið út av og er komin til tað sjálvstøðugu sannføring, at Danmark er ikki nakað kúgingarveldi, og at føroyingar hava tað betri saman við Danmark, enn nøkur tjóð hevur tað saman við øðrum londum! Hann er so skilagóður og keldukønur, at hann sjálvur hevur funnið út av, at vit føroyingar hava tað t.d. nógv betri enn delikatu vinmenn hansara, baskarar (ETA) og írar (IRA)!!! Álvaratos! Einastandandi stórfingið! *Quelle merveille! Tableau!* Tað kann altso glógva sjálvt í einum tjóðveldismanni!

Vit mugu sanna, at SS av tjóðveldismanni at vera er hendinga skjótt-fatandi og gløggur maður, og vit fegnast um, at hann er so frægur, at hann viðgongur, at hann av manglandi kunnleika óbeinleiðis hevur logið dúgliga, miðvíst og leingi – og samstundis ynskja vit honum hjartaliga tillukku við sínum nýggja og dýrtkeypa erkennilsi. Vónandi fær tað eisini eina ávirkan á arbeiðsgevara hansara, tað spakmælta fólkatingsumboðið, sum rættiliga javnliga hevur svínað Danmark út, bæði á veljarafundum, á tingi, í bløðunum, ja, sjálvt í okkara grannalondum, og ikki minst mega vit, fyri sálarfrið Sjúrða Skaales skyld, síggja fram til, at tað rínir við partamann og ideolog hansara, groteskt løgna søgusigaran, harra Zacharias Wang, hvørs undirlutakensla yvirfyri Danmark regluliga hevur fylt føroysk bløð í væl meira enn ein mansaldur.

Um erkennilsið hjá SSi smittar í republikanska liðinum, verður ilt hjá teimum at finna nakra sum helst framtíðar-missión í føroyskum politikki, eftirsum øll teirra hjálparleysa stremban higartil hevur verið bygd á primitivar figgindamyndir og fantastiskar huldusøgur, so sum ta stereotypu mytuna um danskan yvirgang og stupidu lygnina um brutalan danskan hjálandspolitikk. Tað hevði tí klætt allari leiðsluni í tjóðveldis-flokkinum at farið eina sanna pílagrímsferð til ST fyri at skrifta og sóna allar sína grovu politisku syndir mótvegis Danmark og biðið so mirðiliga um fyrigeving fyri allar sína ótrúligu lygnir, allar sínar óálítandi mytur, fyri ikki at tosa um øll hini ólukkubrøgd teirra! Men *hesu ferð* áttu teir *sjálvbjargnu* republikanarar at goldið ST-útferðina sjálvir, og sloppið dønum undan.

Arvafíggindarnir í Føroyum – hyggið her?

Hans Birgir Hansen
Samfelags ívirksetari í føroysku bløðunum

Tað er gerast fríur, frælsur, vinna javnbjóðis rættindir, privatlívsfriðin, tryggja ímóti óviðkomandi uppileggjanir, uttanífrá, tað er ídag framtíðin, og at gerast sjálvstøðugur og vinnurekandi v.m.?

Tað hevur kosta mær ómetaligt nógv strev og stríð og kropslig orka, tíð, peningur, við dirvi, áræði, stríðs, viljastyrki, at vinna á øllum sínum arvafíggindum, í tí dagliga stríði í heldur áfram í dag?

Tað at greiða uppruna til hví alt er grundleggjandi skeivt og órættvíst skipað í samfelagshøpi, er tí at samfelagið, landshúsarhaldið, handils- vinnulívið og vinnurnar, ikki eru tillaga brúkarum í dag?

Tað hevur týdning at fáa skipa heima og úti arbeiði og frítíðararbeiði og privatlívið, hjá allari familjuni og einstøku og lesnað og lærutíðina, so øll hava nóg mikið at takast við í tí dagliga lívið?

Tað at sýna øðrum hvør ein er og hvat ein tekst við hevur í dag týdning, skal ein koma víðari í dagliga gerandislívinum og ikki falla í fátt, við ikki at lata seg ávirka av negativum kreftum? Tað hevur loyst seg at stríðast við alt og øll í tí dagliga gerandislívinum í Havnini/Suðurstreymoy, og vísa á hvussu ein kemur øllum grundleggjandi skeivleikum og órættvísi til lívs sum skjótast?

Tað at arvafíggindar í tí dagliga ignorera meg í Havnini/Suðurstreymoy, kemst av tí at øll kenna seg raktan av einum í eingin hevði rokna við fór at geva øllum av grovfiluni í lesarabrøvunum?

Tað hevur fført við sær at ein er komin meira til sín rætt og at kenna sína ábyrgdir og skyldir sum góður samfelagsborgari ið er góður við tað gomlu Havnini, ið ein vil varðveita sum góð minnir?

Tað at vinna sær fólkatekki og hava alt uppá tað reina og at vera til gaman og álvara er nakað ið ein leggur stórran dent á í øllum tí dagliga samskifti, samstarvi, í arbeiði, frítíð, privatlívi í Havn?

Tað hevur frøtt ein at alt frælsis- og lívslanga arvastríði ikki hevur verið til fánýtis og ein er nøgdur við at hava uppnáa sínum endamálið, sum nevnt omanfyri í innleidningi av lesarabrævinum?

Tað at fólk vakna úr tórnurósudreyminum síggja nakna veruleikan sum hann er í eyguni og finna sítt egna stoði í samfelagshøpi er nakað ið ein leggur upp til í teim túsundtals lesarabrøvum?

Tað hevur týdning at halda áfram við atstríði og skriva lesarabrøv, og fara inn í heildarskipan og støðuna og hugsjónir, atburð, hugburð, málburðir og gera eitt útgreiningar og skipanararbeiði?

Tað at vera einsamallur drongur/maður ger alt nógv lættari tá ið ein sleppur sær av við øll í dagliga plága ein edrúuliga og sjónliga ávirkaði ið ikki hava fult tamarhald á sjálvum sær í Havnini?

Tað hevur verið gjørt vart við at ein roynir at innheinta alt tað í ein hevur forsømt, vegna